LYSINGARTORGIÐ

Lýsingartreytir fyri ókeypis lýsingar:
Privatar lýsingar í mesta lagi 40 orð, bert ein lutur í hvørjari lýsing, hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Frá fyritøkum og virkjum.
Lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur«
Bill. merktar.

Minsta gjald fyri lýsingar:
70 kr. við MVG hvørja ferð.

Akfør

BILUR TIL SØLU
Ford Escort 1,4 5 hurðar. Àrg 94. Til sølu fyri 12,000 kr. Við fylgja 4 heilársdekk á felgum.
Tlf 217273 eftir kl 17

PEUGEOT 307
Peugeot 307 til sølu vegna flyting av landinum. Árg: 03. Km: 62.000. Litur: gráur met. Í góðum standi.
Ring 217300 ella +45 41409056

MÓTORSÚKKLA
Ein SUZUKI SV 650 til sølu, 6 mánar gomul.
Ring á 221583 fyri at hoyra nærri

NISSAN PATROL 2.8
Patrol frá '96 seinast sýndur '05 koyrt 230.000 km, bláur/gráur, 2 hurðar, styttra modelli, 2 setur, krók.
261593

AVHEINTINGARTILBOÐ
Vetrardekk, 16" á stálfelgum, fáast við at avheinta tey. Dekkini klára ein vetur afturat. Passa til Ford Mondeo.
219859

MITSUBISHI PAJERO
Mitsubishi Pajero, árg. 88. Bíliga til sølu.
tlf 213575

TOYOTA COROLLA VERSO
1.8 Terra frá 2002 til sølu. Koyrt 53.000.
Tlf. 521833

RENAULT MEGANÉ
1.6E, árg. 96 til sølu, summardekk og píkadekk fylgja við,
Tlf. 215465

ROVER 200 TIL SØLU
Bilurin er frá juni 98, einans koyrt 75.000 km. Hann er í góðum standi og sær sera gott út. Nýggj píkadekk og nýggj summardekk á nýggjum felgum. Bilurin er sýnaður mars 2006.
Tlf. 506969/506968

Alt til akfør

BILAR
Til sølu. Viðfestikrókur til Toyota Yaris frá árg 2001 til 2005 Kúlan kann takast av. 3000 kr. Og sportfelgur við dekkum til toyota carina E fyri 4000 kr
217608

4 PÍKADEKK
á felgum til Opel Kadett 1.6, lítið brúkt, til sølu.
Tlf. 313137

Barnaútgerð

ODDER STÓLUR TIL SØLU
Ein myrkagrønur Odder stólur til sølu. Lítið brúktur og í góðum standi. Nýprísur 4400 kr. Til sølu fyri 1800 kr.
Ring 268634

TVÍBURÐAKLAPPVOGNUR
Myrktbláur "Basson" tvíburða-klappvognur við toppkalesju til sølu.
Ring 320266 eftir kl.17

KLAPPVOGNUR TIL SØLU
Tvillinga-klappvognur við kalesju til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 506510

BILSTÓLUR
Góðkendur Hauck bilstólur, 0-13 kg. Bert brúktur til eitt barn. Nýprísur uml. 1.200 kr. Til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 506510

HEVUR NAKAR
eitt veggja pusliborð at selja mær? vinarliga ring á
Tlf. 250849

Bátaútgerð

SNELLIR
Oilwind, sjálvfiskandi, til sølu.
Tlf. 229408

Burturm. /funnið

TELEFON BURTURMIST
hevur nakar sæð mína reyðu Sony Ericsson telefon í eg misti burtur vikuna áðrenn jól í Fuglafiði, so vinarliga ringið
228894

FRAKKI
Tann sum av misgávum, tók mín frakka í Eclipse tann 26.12. Verður vinarliga biðin at lata hann inn aftur
253124

EINAR BRILLUR
við bláum stelli burturmistar, helst á strekkinum millum Tórsbyrgi og Eysturskúlan.
Tlf. 314332
514332

TIT, SUM LÆNTU
stóru grýtuna frá J. Dahlsgøtu 13 yvir jólini, vinarliga stilla hana aftur. Gott nýggjár.

GULLRINGUR BURTURMISTUR
við blá/grønari perlu burturmistur á gongugøtuni. Vinarliga ring um tú hevur funnið hann.
Tlf. 310667
252785

Býli í Føroyum

ÍBÚD SØKIST
Vit eru eitt ungt par, ið leita eftir íbúð í Havn. Fara væl um og gjalda til tídina. Max. 5000 kr. um mánaðin við øllum.
593802

ÌBÚÐ YNSKIST
Par í 20´unum søknast íbúð í Tórshavn. Max. 4000-5000 kr. við el + hita.
Tlf.: 275810 / 219859

HÚS Á TVØROYRI
Hús í Tvøroyrar Kommunu ynskjast til leigu til par við barni.
261885

ÍBÚÐ Í KLAKSVÍK FRÁ FEBRUAR
Íbúð við einum sovikamari, lítlum kamari/pulterrúm, stova/køkur í einum og wc v/brúsu. Til leigu frá februar 2007. Søkt verður eftir friðarligum leigara. Prís uppskot 3.500 + olju.Skriva um teg/tykkum á
tilleigu@gmail.com

ÍBÚÐ Í SALTANGARÁ
20 ára gomul lesandi ynskir lítla íbúð í Saltangará/á Glyvrum bíliga til leigu fram til heyst 2007. Alt hevur áhuga.
Vinarliga ring á 264131

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Nýggj íbúð 75 fermetrar, á Blómubrekku, til leigu frá 1. februar. Leigusáttmáli kann útvegast fyri nøkur ár.
elbi@kallnet.fo

ÍBÚD YNSKIST
21 ára gomul genta søkir ibuð i Klaksvík, royki ikki.
Tlf. 224227

GÓÐ ELDRI HÚS
mitt í bygdini á Eiði kunnu fáast til leigu frá 1. januar 2007.
Tlf. 224654

ÍBÚÐ YNSKIST!
Vit eru 2 gentir í tjúgunum, ið søkja íbúð í Havn. Báðar hava fulltíðarstarv, fara væl um og roykja ikki. Vinarliga ring á
Tlf. 260459, Marita

YNSKIST Í HOYVÍKSHAGANUM
suður: Grundstykki ella hús ynskist til keyps í Hoyvíkshaganum suður. Vinarliga ring
Tlf. 583382

ÍBÚÐ Í MIÐBÝNUM Í HAVN TIL LEIGU
Ein íbúð nærindis miðbýnum í Havn til leigu. Hon er til støddar umleið 90 fermetrar: Durur, gong, WC, tvey kømur, stór stova, køkur, goymslurúm. Vælegnað til tvey friðarlig fólk. Depositum krevst. Kostnaður: 5.500 kr + ljós og hita. (1.500 kr)
Tel 584107

Býli uttanlands

NÆR AALBORG
Totalumvæld hús upp á 200m2 norðanfyri Aalborg til leigu fyri 4.400,- um mánaðin. Stórur havi. Vælegnað til lesandi ella familjur. Kann vera møblerað.
Tlf: 236511T-post: nidkg@yahoo.dk

Dansur

HUGNAKVØLDIÐ Á KELDU Í SKÁLAVÍK
við føroyskum dansi, dansispølum og gamlamannadansi verður 13. januar kl. 19. Tilmelding áðrenn 10. januar kl. 22 á Statoilstøðini tlf. 361101 ella Shellstøðini tlf. 361046. Bussur koyrir úr Skopun um Sand kl. 18 úr Dali.

FØROYSKUR DANSUR Í SJÓNLEIKARHÚSINUM
Aftur í ár skipar Dansifelagið Tøkum Lætt fyri 13. kvølds dansi leygarkvøldið tann 6. januar. Byrjað verður kl. 22.
Tøkum Lætt

STÓRI ÁRLIGI
grýludansurin við Showmenn verður í Mentarnarhúsinun í Fuglafirði 17. februar.
Kom og dansa

DANSIFELAGIÐ Á LÁTRINUM
6. januar 2007 verður almennur 13. kvøld dansur í Sjónleikarhúsinum í Havn. Um undirtøkan er nóg stór, verður farið við bussi. Tekning í seinasta lagi dagin fyri.
Nevndin

Dýr

FITTIR KETTLINGAR LATAST DJÓRAVINUM
Daisy hevur fingið 4 sera fittir, vakrir og góðir kettlingar sum um uml. 1 viku eru klárir at koma heimanífrá. Ein er longu latin. Vilja tit hava kettling? Vit kunnu maila tykkum mynd.
Ring ella send sms á 590807

HUNDAHVØLPAR TIL SØLU
Vit eru nakrir ektaðir Amerikanskir-Cocker-Spaniel hundahvølpar við Dansk Kennelklub ættartalvum. Eru kannaðir, vaccineraðir og chipmerktir av djóralækna. Sera barnavinarligir og vælegnaðir til føroyska veðurlagið. Kunnu latast 11. januar 2007. Hygg eftir okkum á www.sudurgard.fo/ítriv
Tlf. 441728 ella 221684

PAPAGEYKUR
Eg eri ein 3-ára gamal "rødhalet grå jaco". Dugi at siga nøkur orð, og merkilig ljóð, so sum hosta og njósa... Eg elski at fáa nógva uppmerksomheit. Eg læri so leingi eg livi, og tað kann verða eini 50 ár. So eg kann verða TÍN vinur fyri lívið, bara tú hevur tíð til mín. Við í prísinum er eitt stórt búður, og ein spildurnýggjur standari. Selist fyri 9000.-
227023

HUNDUR
Ein labradorhvølpur verður latin hundavini skjótast til ber. Er 12 viku gamalur og er blandaður.
Ring 318298 ella 269476

AKVARIUM
Eitt 53 l. akvarium við ØLLUM til sølu fyri 1.500 kr
265661

DJÓRAVINIR
lata kettuna hjá sær chipsmerkja, so teir fáa hana aftur, um hon er blivin burtur í nýggjársskjótingini.
Djóraverndarfelagið, tlf. 504533

HVØR VIL HAVA MEG?
Hey, eg eri ein 5-6 mðr. gomul tík, ið skal hava ein nýggjan eigara. Eg eri hvít við brúnum plettum, havi slættan pels og eg eri so fitt. Verður latin djóravini.
Tlf. 515757

Fartelefonir

SONY ERICSSON
Upplada, svørt Sony Ericsson Z532i, óbrúkt, til sølu fyri 200,-
Tlf. 313406 eftir kl. 18

Fundir

HAGAFUNDUR FYRI VØRÐUFELLI
Hagafundur fyri Vørðufelli í Sørvági verður tann 12. januar 2007 kl 19 í Sørvágs skúla. Til viðgerðar:
1:Rokniskapur
2:Ymiskt
Hagastýrið

KYNDIL
Lýst verður til eykaaðalfund leygardagin 13. januar 2007 kl. 16.00 í Kyndilshølunum. Skrá: Nevndarval o.a.
Kyndil

HAVNAR BJARGINGARFELAG
Eykaaðalfundur verður í Havnar bjargingarfelag sunnudagin 7. jan kl 16 á Landsbókasavninum.Skrá:
1. Bátamálið
2. Ymiskt
Havnar bjargingarfelag

Húsarhaldstól

KOMFÝRUR TIL SØLU
Ein husqvarna komfýrur, emhetta og eitt køliskáp sum krevur lítla ábót. Tilsølu fyri 1000 kr.
Tlf. 508026 ella 214022

Innbúgv

SOFA TIL SØLU
3 pers. sofa við bókatræ stelli, ullint stoff, er nakað slitið, 1.500,- kr. Nýprs. 10.000,- kr.
Tlf. 521986/321986

Leikur

PLAYMO YNSKIST
Er nakar, sum vil selja brúkt Playmo, vinarliga ring
Tlf. 449996/224087

Lutaseðlar

SUNDA RÓÐRARFELAG
tølini í drigin vóru til lutaseðlarnar hjá Sunda Róðrarfelag:
1. 2098 2. 1696 3. 1666 4. 10
5. 779 6. 1569 7. 214 8. 1777
9. 292 10. 1964 11. 1037
Vinningar kunnu fáast við at ringa á
222079 eftir kl 18

Matur

TURRAR GRINDALYKKJUR
Góðar turrar grindalykkjur til sølu.
tlf. 217333

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Alt til akfør	❑ Amboð
❑ Arbeiði	❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð
❑ Bátaútgerð	❑ Bingo	❑ Brævaskifti
❑ Burturm./funnið	❑ Býli	❑ Býli uttanlands
❑ Bøkur	❑ Dansur	❑ Dýr
❑ Fartelefonir	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súkklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl 12.00 dagin fyri útgávudagin, t.v.s. at lýsingin til mánadagsblaðið skal vera okkum í hendi fríggjadag á middegi.
Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.
Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki